Kyndil-Neistin 34-25(14-12)

# Tryggur sigur til Kyndil

**Menninir hjá Kyndli komu sunnudagin ájavnt við H71 og VÍF í oddinum í Atlantic Airways kappingini, tá ið teir vunnu ein tryggan sigur á grannunum úr Neistanum**

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Undan dystinum móti Neistanum á Hálsi sunnudagin, høvdu kyndilsmenn taptu tvær tær seinastu ferðirnar, ið teir høvdu verið á vølli. Fyrst taptu teir farna vikuskifti oddadystin móti H71 í Hoyvík, og mikukvøldið taptu teir fyrru hálvfinaluna í Coca Cola kappingini á útivølli móti strandingum.

### Munurin var sjónligur

Dysturin sunnudagin vísti tann styrkismun, sum í løtuni er á teimum báðum havnarliðunum. Neistin hevur í ár ikki havt somu styrki, sum teir hava havt undanfarin ár, meðan Kyndil liggur og berjist um oddasessin.

Sunnudagin gekk javnt á fyrstu tíggju minuttirnar, men so gjørdi Kyndil ein lítlan vørr og legði seg nakað fram um grannarnar.

Neistin royndi tó at hanga í, og hóast Kyndil eitt skifti í fyrra hálvleiki var á odda við fimm málum, so megnaðu teir bláu at minka um munin aftur, so at tað í steðginum einans vóru tvinni mál á muni.

### Breiddin var brúkt

Beinanvegin eftir steðgin setti Kyndil ferð á, og hóast neistamenninir so dánt megnaðu at fylgja við, so var tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn tað fór at eydnast teimum grønu at leggja sjógv millum seg og Neistan.

Hetta hendi um miðjan seinna hálvleik, tá ið Kyndil fór frá at verða á odda 22-19 upp á 28-19 innan fyri einans seks minuttir. Tá misti Neistin luftina, og so var eingin vegur aftur.

Tað, ið eftir var av dystinum, var fyri so vítt bara ein avgreiðsluspurningur, og Neistin hevði ongan trumf, sum teir kundu nýta í eini seinastu roynd at fáa grannarnar aftur.

Við sigrinum legði Kyndil seg ájavnt við VÍF og H71 á ovastu rók, og kappingin í fremstu mansdeildini sær út til at gerast sjáldsama spennandi í ár.



*Menninir hjá Kyndli vunnu sunnudagin ein tryggan sigur á grannunum úr Neistanum, sum tykjast alsamt meiri einsamallir í botninum.*

*Savnsmynd*

**FAKTA**

**Kyndil-Neistin 34-25(14-12)**
**Kyndil:** Marius Joensen 8, Hjalti M. Jacobsen 6, Rókur Akralíð 5, Høgni Klein 4, Hans Áki Dal-Christiansen 3(1), Hans Arne Thomsen 2, Ken Zachariassen 2, Hanus Johansen 1, Janus Einar Sørensen 1, Poul Rói Mohr 1
**Neistin:** Blagoje Buha 11(3), Johan Brekkustein 5, Tróndur Kragesteen 4, Jens Mohr 2, Birgir Poulsen 1, Finnur Petersen 1, Kári Horn 1
**Brotskøst:** Kyndil 1(1), Neistin 4(3)
**Útvísingar:** Kyndil 3, Neistni 8
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen og Heri Petersen
**Áskoðarar:** 315

---

Søljan-Tjaldur 18-15(8-7)

# Tættur dystur á Giljanesi

**Heimaliðið dróg longra stráið, tá ið Tjaldur vitjaði Søljuna á Giljanesi í gjár.**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan var um ein dyst millum tey bæði niðastu liðini í fremstu kvinnudeildini, og tað er einki dulsmál, at Søljan var favorittur at vinna dystin.

### Gekk javnt á

Tað gekk rættuliga javnt á millum liðini bæði, og serliga í fyrra hálvleiki var lítil munur á liðunum báðum. Men tað var allatíðina heimaliðið, ið hevði hug at stinga nøsina framum, og tá ið farið var um miðjan seinna hálvleik, og dysturin skuldi avgerast, slóg Søljan til.

Eftir bert at hava verið á odda við einum málið, tá ið eitt korter var eftir at leika, fingu tær sær eina fýramálsleiðslu, og so var ikki meiri krút eftir í runavíkskvinnunum.

Við sigrinum syrgdi Søljan fyri, at tær fingu eitt sindur av luft niður til Tjaldur á aftasta plássinum.

**FAKTA**

**Søljan-Tjaldur 18-15(8-7)**
**Søljan:** Heidi Maria Akselsen 7(2), Fía Selma Nielsen 3, Lovisa Niclasen 3, Sólja Jóanisdóttir 2, Irdi Mikkelsen 1, Hertha Simonsen 1, Arnleyg Haraldsen 1(1)
**Tjaldur:** Maya Hecimovic 6, Jasmin Dovovc 4(1), Kristina Ellingsgaard 2, Anni Højgaard 2, Mona Langgaard 1(1)
**Brotskøst:** Søljan 3(3), Tjaldur 4(2)
**Útvísingar:** Søljan 5, Tjaldur 4
**Áskoðarar:** 79

---

StÍF-KÍF 24-25(13-14)

# Kollfirðingar syrgdu fyri tí óvæntaða

**KÍF syrgdi fyri einum tí mest óvæntaða úrslitinum higartil í ár, tá ið teir koppaðu strandingum á Skála.**

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ein skuldi trúð, at strandingar høvdu sjálvsálitið í lagi undan dystinum móti kollfirðingum á heimavølli sunnudagin. StÍF leikti jú hálvfinalu móti Kyndli í steypakappingini mikukvøldið, og tá vunnu teir ein tryggan sigur á havnarliðnum. Men tá ið KÍF vitjaði sunnudagin, var mótstøðan ein onnur.

### Fullmannaðir strandingar

Tað er eisini vert at hava í huga, at í hálvfinaluni mikukvøldið vóru strandingar bæði málverjan Marian Cirloganescu og sterka skjúttan Svein Justinussen fyriuttan, og harafturat kom Leivur Justinussen heldur ikki á vøllin móti Kyndli. Hesir vóru tó allir tríggir á vøllinum sunnudagin, men tað var ikki nóg mikið til at koppa einum KÍF-liðið, sum stríddist sum úlvar á skóg.

Tað er og hevur altíð verið eitt eyðkenni fyri KÍF, at teir kanska ikki spæla tann mest poleraða hondbóltin, men ístaðin stríðast fyri hvørjum einasta bólti. Soleiðis var eisini sunnudagin, har kollfirðingarnir arbeiddu serstakliga væl fyri hvørjum øðrum, men til tíðir borðreiddu teir eisini við heilt góðum hondbóltsspæli.

### Smeitur fyri strandingar

Dysturin var ógvuliga javnur, og hóast liðini skiftust um at verða á odda, so var tað serliga kollfirðingar, sum høvdu munin í seinna hálvleiki. Eftir at Damir Oros seks minuttir inn í seinna hálvleik hevði lagt KÍF á odda 17-16, eydnaðist tað ongantíð strandingum at koma upp á javnt aftur.

Við ósgrinum fyri KÍF misti StÍF eitt týðandi stig í oddastríðnum. Høvdu teir vunnið, vóru teir nú ájavnir við VÍF, H71 og Kyndil, sum eru púra jøvn á ovastu rók, men ósigurin hevur við sær, at teir eru tvey stig aftan fyri oddaliðini. Kollkærkomnan sigur, og talan verður neyvan um seinastu ferðina, at teir fara at seta kílar í hjá onkrum av fremstu liðunum.



*Við sínum níggju málum var Damir Oros toppskjútti hjá KÍF, sum heldur óvæntað basti strandingum á Skála sunnudagin.*

*savnsmynd*

**FAKTA**

**StÍF-KÍF 24-25(13-14)**
**StÍF:** Alexandur Johansen 10(5), Arthur Johansen 5(2), Bent Djurhuus 3, Sveinur Justinussen 2; Esbern Jacobsen 1, Mortan Hansen 1, Bárður Danielsen 1, Leivur Justinussen 1
**KÍF:** Damir Oros 9(2), Gert Hansen 4, Arnbjørn Hansen 4(1), Sune Davidsen 3, Petur Martin Poulsen 2, Mirko Milinkovic 1, Rógvi Weyhe 1, Karl Johan Djurhuus 1
**Brotskøst:** StÍF 7(7), KÍF 4(3)
**Útvísingar:** StÍF 2, KÍF 4
**Dómarar:** Rúni Mohr og Ragnar Simonsen